# Todi skal spæla móti Skála

Todi Jónsson og Start skulu spæla í UEFA Cup móti Skála. Tá ið luturin varð kastaður seinnapartin í dag, var Skála hepnari enn GÍ, sum skal til Letlands at spæla móti FK Ventspils. B68 spældi ímóti hesum liðnum í 2004. Letlendingarnir vunnu 3-0 á heimavølli og 8-0 á útivølli.

Todi Jónsson sigur við norsku pressuna, at bæði tey føroysku liðini í UEFA Cup - Skála og GÍ - í styrki mugu roknast sum miðal lið í næstbestu norsku deildini. Tey eru torfør at spæla ímóti, men vit eiga sjálvandi at vinna á Skála, heldur Todi Jónsson.

Skála skal spæla á heimavølli hósdagin 13. juli og í Kristiansand 27. juli.

GÍ skal spæla í Letlandi 13. juli og á heimavølli 27. juli.

**-jh**



# Agassi gevst

36 ára gamli Andre Agassi boðar nú frá, at hann fer at gevast við tennis á hægsta støðið. Fráboðanin kom á tíðindafundi, sum varð hildin undan Wilmbledon kappingini, og sigur hann, at seinasta kappingin hjá sær verður US-Open, sum er seinasta Grand-Slam kappingin á árinum.

Agassi hevur seinnu árini havt trupulleikar við einum argandi ryggskaða, og er hesin fremsta orsøkin til, at veteranurin nú gevst.

– Eg havi bíðað við at boða frá hesum, men nú er løtan tann rætta. Hetta er jú staðið, har alt byrjaði, staðfesti Agassi, sum í 1992 vann sín fyrsta Grand-Slam sigur – júst á Wimbledon.

**-mørk**

## Eingin mótmælti kortunum

Hóast fýra reyð kort í einum og sama dysti ljóðar av nógvum, so vórðu fáar atfinningar vendar móti dómaranum eftir dystin.

Soleiðis tóktust bæði B68-málverjin, Tórður Thomsen, og ein av útvístu vágbingunum, Suni í Hørg, samdir um, at dómarin hevði handlað rætt í øllum fýra førunum.

– Eg varð klíptur í síðuna, og tí reageri eg, sum eg geri. Tað er sjálvandi ikki rætt, men talan er um botnuppgerð, har báðir partar vilja hava stigini fyri ein og hvønn prís. Og tað er so tað, sum hendir, segði Suni í Hørg eftir dystin.

**-mørk**

## Reytt og gult eftir útskifting

Talan var um heldur sjáldsom kort, sum Ralph Van Dooren hjá B68 fekk á jóansøku. Spælarin var longu skiftur út, tá hann brádliga vildi inn aftur á vøllin. Hetta noktaði dómarin honum sjálvandi, og tá spælarin mótmælti hesum, fekk hann gult kort. Eftirfylgjandi gekk Van Dooren heldur provokerandi framvið – og enntá inn á – vøllin, tá hann var á veg yvir til VB-húsið, og so tímdi Petur Reinert ikki at síggja meira. Reytt kort til spælaran, men B68 helt tó fram við 11 monnum, tí útskiftingin longu var framd.

**-mørk**

VB/Sumba-B68 1-1 (0-1):

# Rok og reytt í Vági

**Eldur kom veruliga í fjúsi móti dystarenda í Vági. Seinasta korterið rak dómarin ikki færri enn fýra spælarar av vølli**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jóansøkan gjørdist minnilig fyri ársins útgávu av Formula-deildini, men í flestar mátar fyri júst skeivu orsøkirnar.

Fyri tað nógva var talan annars um eina kanska ikki so vælspælda men sera intensa botnuppgerð, tá B68 vitjaði hjá VB/Sumba. Og seinastu løtuna kókaði intensiteturin púrasta yvir. Ralph Van Dooren hjá B68 megnaði fyrst og fáa bæði gult og reytt kort eftir at hann var skiftur út. Og móti endanum av dystinum gjørdist heilt galið. Fyrst sá Dan Djurhuus reytt, tá hann langaði álboga í flatbróstið á toftamanni. Og í ruðuleikanum, sum fylgdi, fingu bæði Øssur Jacobsen og Suni úr Hørg reyða kortið, tá teir fóru at togast. Til rós fyri dómaran skal sigast, at øll kortini væl og virðiliga vóru upp á sítt pláss, og við at halda høvdinum púrasta kalt allan vegin, forðaði hann eisini fyri, at rokið ikki gjørdist enn størri, enn tað longu var.



*Toftamenn vóru vónbrotnir. Hóast VB/Sumba helst hevði útjavningina uppiborna eftir stórt trýst allan seinna hálvleik, so kendist tað svárt, tá málið kom í sætta minuttinum, sum dómarin hevði lagt afturat vanligu leiktíðini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Málrevurin hjá B68

Sjálvandi vóru tað reyðu kortini, sum vóru í fokus, tá tosað varð um dystin. Men undan øllum hesum hevði talan verið um ein hampuliga undirhaldandi dyst, ið eisini tænti sum upphiting til kappróðurin á stevnuni.

B68 hevði lotið undan fyri steðgin, og í løtum eydnaðist teimum eisini at leggja trýst á. Tað gav eisini úrslit, tá 17 minuttir vóru farnir. Marcyn Dawid fekk bara hálvbjargað, tá Kristian Anton Andreasen smekkaði til móti málinum, og so stóð Súni Fríði Barbá enn einaferð á rætta staðnum til røttu tíðina.

### Risa-dropp

Eftir steðgin vóru tað vertirnir, sum stóðu fyri tí mesta. Teir søktu støðugt oman mótt B68-málinum, men fram til tað allar seinasta tóktist B68 standa ímóti. Ikki minst tí Tórður Thomsen stóð ein branddyst á málinum, har hann hevði einar tríggjar klassabjargingar, tá helst øll onnur uttan málverjin sjálvur mundu síggja bóltin í meskunum.

Nærum seks minuttir inn í yvirtíðina gekk tó galið hjá Tórði – heilt galið. Tá alt rokið við mongu reyðu kortunum loksins hevði lagt seg, tók VB/Sumba hornaspark. Bólturin varð í fyrstu atløgu sendir útfrá, og av síðulinjuni gúppaði Christian Solbjerg bóltin inn aftur í brotsteigin. Ivaleyst helt Tórður, at bólturin var á veg út til málspark, og hann mundi neyvan trúgva sínum egnu eygum, tá bólturin legði seg til rættis í málinum.

Ein keðiligur endi hjá málverjanum, sum eisini átti sín lut í, at B68 ikki tók stigini, tá teir seinast vitjaðu í Vági. Ta ferðina varð Tórður rikin av vølli fyri at nýta hendurnar uttan fyri brotsteigin, og hesa ferð setti stóra droppið altso punktum fyri einum annars framúr avriki.

### Dýr leikbann

Hóast vágbingar sjálvsagt fegnaðust um útjavnandi málið, so skerst ikki burtur, at reyðu kortini til liðið komu illa við. Komandi vikuskiftið skal VB/Sumba á vitjan hjá ÍF, har enn eitt niðurflytingarbrak stendur á skránni, men tann dystin mugu teir so standa seg uttan teir báðar, sum hesa ferð fingu reytt kort.

Hjá B68 er talan eisini um leikbann til tveir spælarar, og tað man heldur ikki hóva Jóannes Jakobsen nakað serligt. At talan so samstundis verður um útidysti móti oddaliðnum í Formula-deildini ger neyvan uppgávuna meira hugagóða í so máta.

## Málhýrur í B36-leguni

Talan var mest sum um sanna málveitslu hjá B36, tá Hanus Thorleifsson økti til 4-1 í Gundadali sunnudagin. Hetta var nevnliga fyrsta ferðin í tvey kappingarár, at árstalsfelagið í høvuðsstaðnum skoraði somikið nógv mál í einum dysti. Tá B68 vitjaði á seinasta leikdegi í 2004 taptu teir 6-2 fyri B36, men síðani hevur gingið sera striltið við málskjótingini. Soleiðis vann B36 í fjør tveir dystir við 3-0, meðan munurin í øllum hinum førunum var minni. Soleiðis var talan sunnudagin eisini um trivaligasta landskappingarsigurin síðani 8. mai 2005, tá GÍ var á vitjan í Gundadali.

**-mørk**

## Gott at vinna stórt

Kenneth Jacobsen á høgra bakki tóktist vælnøgdur, tá B36 hevði vunnið trivaligasta sigurin í Formula-deildini nakrantíð.

– Eg veit ikki, nær vit seinasta hava skotið fýra mál í einum dysti, men undir øllum umstøðum var hetta deiligt. Hóast vit hava staðið okkum væl í hesi bæði seinnu árini, so hevur tað verið strævið, tá mann ongan tíð hevur vunnið nakrar "léttar" sigrar.

Og hvat var tað so, sum brádliga riggaði hjá tykkum?

– Vit skora upp á nakrar av møguleikunum. Tað er væl tann størsti munurin.

Hini úrslitini lagaðu seg so, at tit nú bara hava tvey stig upp til oddin. Ger tað ikki, at tit iðra tykkum um javnleikin móti VB/Sumba fyri tveimum vikum síðani?

– Tað fáa vit ikki brúkt til nakað. Vit kunnu framvegis avgera alt sjálvir, og tað ræður um at hugsa frameftir, staðfestir Kenneth Jacobsen.

**-mørk**